## USA vil hava Polanski

Amerikonsku myndugleikarnir krevja nú at fáa tann kenda filmleikstjóran Roman Polanski útflýggjaðan úr Sveis. Myndugleikarnir í Sveis vátta, at teir hava fingið eina áheitan úr USA um at senda tann 76 ára gamla leikstjóran yvir um Atlantshavið. Polanski hevur sitið í varðhaldi í Sveis í fleiri dagar í sambandi við, at hann er skuldsettur fyri at hava neyðtikið eina 13 ára gamla amerikanska gentu fyri 32 árum síðani. Polanski hevur viðgingið, at hann hevði kynsliga samveru við gentuni, men at talan ikki var um revsiverda framferð.



## Størri dent á Norðurlond

Eina ferð um árið viðger grønlendska Landstingið uttanríkispolitikkin hjá landsstýrinum, og hesaferð var tað í gjár. Í frágreiðingini hesaferð boðaði landsstýrið frá, at tað fer at leggja størri dent á at menna samstarvið í Norðurlondum. Ígjøgnum Norðurlandaráðið ætlar landsstýrið at virka fyri orðaskifti um spurningar viðvíkjandi tí arktiska økinum, og at Grønlande skal fáa ávirkan á arbeiðið í ES og øðrum felagsskapum. Á Norðurlandsráðsfundinum í Stockholm í næstu viku umboða Olga P. Berthelsen úr IA og Aleqa Hammond úr Siumut Landstingið.

# ar kenna sterkan samleika




*Rógvi Absalonsen legði úrslitið fram umvegis Skype, meðan Margretha Jacobsen stýrdi fundinum úr Uttanríkismálaráðnum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

eru ungir – langt yvir helmingurin er undir 30 ár – og hitt er, at teir hava búð stutta tíð í Bretlandi.

Kanningin vísir, at longri tíð útisetarnir búgva í Bretlandi, betri lyndi hava teir at kenna seg sum bretar.

Eitt annað, sum eyðkennir føryskar útiseta í Bretlandi er, at teir enn ikki hava tikið støðu til framtíðina.

- Teir eru stutt síðani byrjaðir eina 5-6 ára langa útbúgving, og tí liggur ein avgerð um eina framtíð eftir loknan lestur langt frammi í tíðini. Hetta er helst orsøkin til, at fleiri av teimum lesandi sjáldan hugsa um Føroyar og framtíðina, sigur Rógvi Absalonsen.

### Vakt ans

Rákið er so, at alt fleiri føroyingar velja víðari lestur í Bretlandi, fyrst og fremst Aberdeen og London. Hetta hongur ikki bert saman við betraðum stuðulsmøguleikum, tí tað vísir seg, at talið av lesandi í Danmark kvinkar niðureftir.

Rógvi Absalonsen vísir á, at meðan lestrarumhvørvið í Aberdeen er rættiliga líkt tí í eitt nú Århus, so er lestrarumhvørvið í London nógv ørvísi.

Kanningin vísir, at føroyingar í Aberdeen hava munandi lættari við at finna saman, enn føroyingar, sum lesa í London.

- Bæði mentan og samfelagsviðurskifti í London eru ógvuliga ólík teimum í Danmark og teimum í Aberdeen, sigur Rógvi Absalonsen.

Kanningin er bygd á 140 spurnarbløð, harav 120 komu inn aftur, og tað má roknast sum ógvuliga góð undirtøka. Umframt hetta hevur Rógvi Absalonsen eisini gjørt 15 samrøður við útisetar í London og Aberdeen, umleið helvt um helvt í hvørjum stað.

Kanningin vísir, at talið á lesandi er umleið 50/50 av hvørjum kyni, meðan ein stórur meiriluti av lesandi í Danmark eru kvinnur. Í Bretlandi er somuleiðis ein ógvuliga stórur partur av útisetunum lesandi, men kortini eru umleið 20% í føstum arbeiði.

Kanningin hevur longu vakt ans í føroysku fjølmiðlunum, og eitt nú fer borgarstjórin í Tórshavnar kommunu í dag til London, har hann skal kanna eftir, hvussu vit fáa føroyskar útisetar í Bretlandi at flyta heim aftur.

> *Eg havi ongantíð ætlað mær til Danmarkar at lisið, men eg havi ætlað mær at lisið. Og eg havi altíð hugsað um Bretland heldur enn Danmark, tí eg haldi tað er okkurt við mentanini her. Havi onkra familju í Onglandi... og vit høvdu BBC í sjónvarpinum fyrr og... hugdi nakað eftir tí... havi tímað væl enskt. Lisið enskar bøkur frá mann var lítil (...). So tað var kanska serliga málið og mentanin, sum vóru meira tiltalandi enn tað danska*
>
> *Kvinna, 27, lesandi, 5. árið í Aberdeen*